Hagin er um 365 ha til víddar. Skipanin er 190 áseyðir. Tað er 31/2 mørk .

Syðraseyður er ein góður summarhagi og vetrahagi, vanliga missur man millum 2-5 seyðir um ári, tó vóru vit so óheldir at missa 33 seyðir í kavastorminum hósdagin 12 jan 2017.Eg fór í hagan tann 14 januar og sá beinavegin at tað var gali vit mistu 16 av teimum reyðu og 10 av Búkonuni ellars fór onkur í hinum fylginum.Tann hendur cirka 15 hvørt ár at vit missa nógvan seyð niðri á hellurókin (Búkonuni) tá er tað umleið 15 seyðir sum fara har.

Hví eg ynski sundurbýti

So havi eg 85 seyðir fyri meg sjálvan, meiningin er at eg keypi pápa mín, beiggja mín, og pápabeiggja mín út, soleiðis at eg eigi 25 gyllin og 85 seyðir fyri meg sjálvan.Tá kann eg fara á fjall ein seinnapart um tað skal verða og komi at fáa meira burtúr, komi at spara fjallfólk, kann taka gjólingarnar heim eftir Apríl fjall og passa teir inni , fyri síðan at hava teir á traðum í bygdini sum eg eigi, harvið blíva gjólingslombini betur og seyðurin í haganum betur tí har verður minni seyður um summari.

Sum nú er fái eg umleið 37-38 lomb til býtis og uppá mína mørk hinar 9 gyllin fáa vit umleið 19, so tað verður umleið 56 tilsamans, tá eg komi at hava einbýttan haga komi eg at hava umleið 75-80 seyðir at slakta so eg komi at fáa umleið 20-25 meir seyðir at slakta um heysti.

Pápi mín var røktingamaður í haganum frá 1963 til 1983 og formaður í hagastýrinum frá 1983 til 2003 eg havi røkta har síðan 2003 havi altíð haft sera stóran áhuga í seyði frá barnsbeini og kenni tí hagan sera væl.

Tað verður skjótari frá handling til gerðir soleiðis at eg ikki skal spyrja hinar eigarnar eftir, men reki hagan soleiðis sum eg vil hava tað og tað kemur at verða stórur fyrimunur fyri meg, eg kann ikki sýggja nakra grund at hagin ikki kann býtast sundur.

Gamla rættin í kellingardali hevur verði brúkt frá 1959 til 2002 hon tekur 160 ær við lombum. Tann rættin er góð at brúka um vári og summari og so kann tann nýggja rættin verða brúkt um heysti. Um man ger ein frágarð uppá 100-200 metrar og lagaðar umleið 2x1 metur sum eru koppaðir er rættin brúkbar.

Her er mynd av gomlu rættini myndin tikin 27/3 2017



Àðrenn grannastevnuna vóru vit í samráðingum um mark frá 9 juni til síðst í septembur, vit blivu ikki samdir um marki og tí bleiv eg noyddur at fara á grannastevnu við sundurbýtingini.

Her er uppskoti frá teimum hvar eg fái norðar part, grundin til at eg ikki kundi góðtaka tað uppskoti var at eg fekk bara umleið 50 seyðir, hvar eg eigi 85 seyðir. Hasum uppskotinum fái eg helludal 16 Hellá 24 og umleið 10 av teimum í Børmum og tað er alt ov lítið.

●●●●● Foroya Tele 19.14 89 %

51

í dag kl. 19.03

Góðan dagin Bernhard

Hinir eigarnir í Syðraseyði hava havt fund 8 august 2017, har vit viðgjørdu ynski títt um at býta frá. Við støði í kortinum ið tú lat okkum hava vit lagt ein kíla afturat í neðra, so at sunnari partur gerst 56% av arealinum á haganum(sí viðhefta kort) Ùt frá kortinum ynskja vit sunnara partin.

Vegna hinar eigarnar
Vilhelm Hansen



Her er uppskoti hinir komu við tá eg skuldi hava Sunnara part, tað sum eg ikki kundi góðtaka við tí uppskotinum, er at tá havi eg bara eini 80 prosent av undirhaganum í neðra, tí meini eg at eg má fáa Búkonuna 22 Botnaseyðurin 28 syðrubarmar 20 og tær reyðu 20. Tá havi eg fingið 90 seyðir 5 for nógv, men eg meini at um eg fái syðra partin skal eg hava 90 seyðir og um eg fái Norðara part 80 seyðir tað komi eg nærri inn á.

Sendt fra min iPhone

Start på videresendt besked:

**Fra:** vilhelm hansen <vilhelm80@hotmail.com>
**Dato:** 28. september 2017 kl. 22.17.53 WEST
**Til:** "august@olivant.fo" <august@olivant.fo>
**Emne: Sundurbýting Syðraseyð.**

Gott kvøld Bernhard.

Hinir eigarnir møttust í kvøld 28-09-2017 at tosað um ynski títt at býta frá.

Vit eru samdir um at vit vilja hava norðara part av haganum.

Vit vilja hava okkara prosent part av áseyðinum(105 áseyðir). Tað viðførur so at fylgið í syðrubørmum má býtast sundur, so at vit fáa 25 áseyðir sunnanfyri Rangagjógv.

Tvs. at tú fært Botnaseyðin, Tær reyðu, Tær á Búkonuni og 5 av teimum í Syðrubørmum.

Vegna hinar eigarnar
Vilhelm Hansen

Øll fylgini í Syðraseyð hava ból ella seyðhús at koma í, tó brúkar fylgi á Búkonuni ikki bóli á tunguni, men fer niður á hellurókin, fylgi á helludali hevur Seyðhús hini hava ból.

Her á hesum kortum sær man bólini og seyðhúsi á helludali.









Hetta yvirllit er útrokna eftir býtin.

Hinir eigarnir eiga 31 gyllin.

Og eg komi at eiga 25 gyllin.

Tvs at eg eigi

25/56*190 = 85 seyðir

Her er útrokningar hvussu eg eri komin fram til bæði uppskotini.

Syðraseyð er vídd 362 ha vísandi til mynd 1.

Vísandi til mynd 2 bera 174 ha 85 seyðir.

174 ha : 85 seyðir = 2,047ha pr seyð.

Tvs at 362 – 174 ha = 188 ha

So bera 188 ha 105 seyðir.

188 ha : 105 seyðir = 1,79 ha pr seyð.

Mítt uppskot er at tann sum fær Sunnara part fær 5 seyðir meir enn hann eigur vegna hann er óhøgliga.

Ì uppskoti 1 har eg fái Norðara part fái eg 80 seyðir og eg havi útrokna at eg eigi 163,76ha

80*2,047= 163,76ha

Ì uppskoti 2 har eg fái Sunnari part fái eg 90 seyðir meir og eg havi útrokna at eg eigi 161,14 ha

90/105*188=161,14ha

Fylgir í Syðraseyð

Botnaseyð 28

Búkonan 22

Syðrubarmar 30

Tær Reyðu 25

Barmar 45

Hellá 24

Helludalur 16

Her er kort yvir fylgini í syðraseyð



Her er kort av tí har eg fái Norðara part

Mynd 3



Her er kort hvar eg fái Sunnari part

Mynd 4



Her er kort sum vísir víddina av haganum

Mynd 1



Her leggji eg myndir av seyðhúsum og bólum í Syðraseyð

Seyðhúsi á Helludali



Hellurókin



Niðara bóli hjá teimum í Syðrubørmum



Bólini hjá teimum í Syðrubørmum ovara og niðara ból

Ovara bóli hjá teimum í Syðrubørmum



Bóli hjá Botnaseyðnum



Bóli á tunguni og hellurókin støða hjá teimum á Búkonuni

Bóli á tunguni



Bóli hjá teimum Reyðu



Bóli hjá teimum við Hellá



Kort sum vísir vídd av teimum 85 Norðaru

Mynd 2




Gjógvin við Hellá
Hellan
Skákgjáir
Torvustrongurin
18
Bólið sunnan fyri Hellá
Torvan
Niðasturøkur
Hellá
Brúgvin í Niðasturókum
Hálvdansgjótan
Í Rókum
Brúgvin í Rókum
Mýran
Syðriseyður
Túgvan
Tungan suðuri í Rókum
Marragjógv
Kjálkin í Marragjóv
Riddarin
Brúgvin í Børmum
Spinhellan
0
200
Kráirnar
400 m
Spinubarmar
Bólið í Børmum
Rættin í Børmum


Tjørnin á Kráunum
Barmar
Rættin í Børmum
Lundanevið
Uppi á Fossi
Rangagjógv
Skúvagilið Norðara
Kassurin
Bólið hjá teimum í Syðrubørmum
Millum Skúvagilini
Ryggurin
Kellingardalur
Skúvagilið Sunnara
Syðrubarmar
Skarvasetur Norðara
Syðriseyður
Nýggja Bólið hjá Teimum í Syðrubørmum
Brúgvin í Syðrubørmum
Bólið hjá Teimum Reyðu
Kellingará
Skarvasetur Heimara
Nýggja Rættin
Tjørnin á Rygginum
24
Mýran
Navastakkur
Byrgisgjógv
Navagjógv
Tungan
Kjálkin í Byrgisgjógv
Bólið í Tunguni
Uppi undir Rókum
Navadrangur/Drangurin á Byrgisgjógv
Búkonan
Navirnar
Bólið í Botnaseyðinum
Niðri í Haganum
Keldan á Stóraleiti
Hellurókin
Rossagøtan
Pitlukrógv
Stóraleiti
Bólið á Pitlukrógv
Oknadalur
Steinurin á Leitinum
Hiplingasetur
N
Brúgvin í Titlaskorum
0
200
400 m
Titlaskorar
Stiggjurin í Titlaskorum

**Fulltrú:**

Undirritaði Flemming Augustinussen, 100 Tórshavn, gevi hervið Bernhard Augustinussen, 360 Sandavágur fulltrú, at umboða meg á útskiftingarfundinum 23/1 - 2020.

Um avgerð verður tikin um, at býta hagan sundur, selji eg mína jørð í haganum til Bernhard Augustinussen, 360 Sandavágur.

Dagfest tann, 17/1 . 2020.

Flemming Augustinussen

Flemming Augustinussen

Vitni: Anna Augustinussen

Vitni: Johanne S. Augustinussen